


# Atlantic Petroleum borar framleiðslubrunn

**Jan Müller**

01.05.2014 - 18:33

Oljan.fo

**Atlantic Petroleum er farið undir at bora enn ein framleiðslunbrunn á Blackbird kelduni. Felagið brúkar boripallin Noble Ton V Langeveld til uppgávuna.**

Blackbird keldan varð funnin í 2008 og hevur framleitt olju síðani 2011. Keldan er bundin í Aoka Mizu framleiðsluskipið, sum eisini tekur ímóti frá enn eini keldu, sum Atlantic Petroleum er partur av, nevniliga Ettrick. Síðani verður oljan flutt við tangabáti til St. Fergus terminalin í Skotlandi. Roknað verður við at brunnurin fer undir framleiðslu í triðja ársfjórðingi í 2014 og fer at fáa stóran týdning fyri samlaðu framleiðsluna. Henda íløgan fer at geva Atlantic skattligar fyrimunur eisini.

Nexen Petroleum U.K. Limited er fyristøðufelag fyri Blackbird við 73.02957%, Nexen Ettrick U.K. Limited 17.57270% og Atlantic Petroleum UK Limited 9.39773%.